## DAGSINS MEINING

# Føroyski lønarvøksturin nógv minni enn í grannalondunum!

Nú er sligið fast við hagtølum, at tímalønin er ikki hækkað meira í Føroyum enn í nøkrum grannalandi tey seinastu árini. Hetta vísir ein kanning, sum búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss hevur gjørt fyri Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, og sum varð løgd fram á ársaðalfundi Havnar Arbeiðsmannafelags leygardagin.

Tvørturinmóti hevur lønarvøksturin hjá tímaløntum í Føroyum verið væl minni enn lønarvøksturin í Íslandi, Noregi, Bretlandi og í Danmark. Hetta merkir, at talan hjá arbeiðsgevarunum um, at tann høgi lønarvøksturin seinastu árini hevur tikið grundarlagið undan føroyska kappingarførinum samanborið við kappingarneytarnar er í andsøgn við nýggjastu hagtølini.

Henda staðfestingin er aftur eitt dømi um, at tað er alt ov illa statt við hagtølum og útgreininginum í Føroyum. Víst eru stórir batar hendir seinastu árini, og vit hava fingið eina vælvirkandi hagstovu, men enn er ikki komið á mál, og tað er gott, at fakfeløg sjálvi lata slíkar útrokningar og kanningar gera.

Kanningin vísir, at lønarvøksturin í Føroyum var frá 1991 til 2003 stívliga 25 prosent, samstundis lønirnar í Íslandi hækkaðu 47 prosent, tær donsku 48 prosent, tær ensku 51 og tær norsku tímalønirnarnar hækkaði heili 57 prosent. Tí má spurnartekin setast við uppáhaldið um, at "stóri lønarvøksturin" í Føroyum hevur nervað kappingarførið í útflutningsvinnuni.

Eftir at føroysku lønirnar ikki hækkaðu í búskparkreppuni fyrst í 90-árunum, hækkaðu tær rættiliga fitt síðst í 90-árunum og eftir aldarskiftið. Men kanningin vísir eisini, at heldur ikki hesi árini hækkaðu lønirnar meira í Føroyum enn í grannalondunum, sum vit kappast við innan fiskavirking.

Sjálvandi hevur lønarvøksturin, eins og aðrar tænastuveitingar, havt ávirkan á kappingarførið, samanborið við tað batnandi kappingarførið tey árini í kreppuni, tá tímaløn stóð í stað. Men kanningin vísir, at arbeiðsgevarar kunnu ikki bara fara eftir lønarhækkingini, sum teir tímaløntu arbeiðarnir fingu frá miðskeiðis í 90-árunum og frameftir.

Neyðugt er eisini at kanna og vísa á aðrar orsøkir, sum hava verið og er medvirkandi til tað minni góða kappingarførið, sum arbeiðsgevarar siga, at vit hava. Eitt nú tilrættalegging, effektivitetur, flutningskostnaður, elkostnaður o.s.fr., eins og tær høgu samsýningar í tænastuvinnuni - grannskoðarar, løgfrøðingar og teldufólk - sum eisini veitir útflutningsvinnuni tænastur.

Víst eru tímalønirnar ein stór útreiðsla, tá okkara útflutningsvørur verður tilvirkað, men tað ber ikki til bara at leggja eftir teimum tímaløntu arbeiðarunum, sum hava nógv ta lægstu lønina her á landi.

Kanningingin sigur ikki alt, men fyribils má sigast, at hon hevur víst á nøkur viðurskifti og er eitt gott íkast til orðaskifti um føroyska lønarlagið og føroyska kappingarførið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Johannu á Bergi í tjakinum í SvF 15/2-2005 og til Egil Olsen í Sosialinum 17/2-2005

**vegna Føroya Ráfiskaseljarafelag,**
*Árni Joensen*



Omanfyri nevndu greiddu m.a. frá, at tað sum hevur størsta týdning fyri marknaðin uttanlands er leveringstrygd, men at hetta kunnu tey føroysku fiskavirkini ikki veita, tí ein av størstu veikleikunum hjá teimum er, at tey ongantíð vita hvørja rávøru tey fáa, tí skipini kunnu vera vekk nær sum helst, um tey halda, at tað júst tá loysir seg betur at landa aðrastaðni.

Teirra loysn á hesum trupulleika er størri samstarv millum virkir og skip, møguliga við heilari ella lutvísari samanlegging.

Føroya Ráfiskaseljarafelag, sum umboðar allar ráfiskaseljarar av botnfiski skilir ikki, at ráfiskakeyparnir ikki á nakran hátt hava roynt at loyst henda trupulleika við at royna at gera fastar avtalur við skip ella bátar um keyp av fiski fyri eitt ávíst tíðarskeið.

Harafturímóti hava nøkur skip spurt ávísar fiskakeyparar, um áhugi var fyri at gera nakrar fastar avtalur um keyp av fiski fyri eitt nærri avtala tíðarskeið, men keypararnir hava ikki so frægt sum svarað fyrispurningunum frá skipunum.

Okkara áheitan til Ráfiskakeypararnar er, at tit heldur gera eina roynd at loysa trupulleikarnar saman við okkum í staðin fyri í tíð og ótíð at fara í fjølmiðlarnar ella til politikararnar at kæra tykkara neyð, sum tit kanska hava eina ávísa ábyrgd av sjálvir.

# Ábyrgd Landsstýrismanna

**Bogi Hansen**
*Velbastaður*

Í vikuni, sum fór, hoyrdi eg eitt brot úr orðaskiftinum á Tingi um orkupolitikk, og tað var skelkandi.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, greiddi frá, at hann trúði ikki uppá, at jørðin ornar, og hann kom við ymiskum grundgevingum. Veruleikin er bara ein annar. Miðalhitin á jørðini er vaksin hesa seinastu øldina; helst millum eina hálva og eina heila grad. At mátingarnar skulu vera skeivar, tí at tær eru gjørdar í bygdum øki, er tvætl. Tað er rætt, at hitamátarar vísa ov nógv, um teir eru í bygdum øki; men hesum verður sjálvandi tikið hædd fyri.

Tað er eisini rætt, at vit í Føroyum ikki hava merkt nógv til upphiting hesi seinastu 50 árini; men tað broytir ikki tann veruleika, at jørðin sum heild og eisini norðara hálva eru hitnaðar. Haraftrat er tað nú farið at hitna hjá okkum, eisini. Mær vitandi, var 2003 tað heitasta árið, sum er mátað í Føroyum (síðan 1890). Um Maldivurnar søkka í havið ella umvent, sum Bjarni sigur, veit eg ikki. Einstøk lond kunnu søkka ella rísa; men tað sigur onki um vatnstøðuna í heimshøvunum, sum heild. Veruleikin er, at vatnstøðan sum heild hækkaði einar 10 - 20 cm í 20. øld.

Tað er í dag ongin grund til at ivast í, at jørðin sum heild hitnaði og høvini sum heild hækkaðu í seinastu øld. Ein partur var av natúrligum ávum; men helst stavaði ein partur eisini frá dálking, t.v.s. frá útláti av koldioxidi og øðrum evnum. Serliga upphitingin hesi seinastu 25 árini verður mett at vera av mannaávum, og tað er lítil ivi um, at dálkingin fer at elva til, at jørðin sum heild hitnar uppaftur meiri, og at veðurlagið eisini í aðrar mátar fer at broytast hesi komandi 100 árini.

Hetta eru næstan allir serfrøðingar í dag samdir um. Sjálvandi eru onkur undantøk. Innan øll øki finnast fólk, sum vilja prógva, at allir hinir serfrøðingarnir taka feil, og hetta er funnin fressur hjá fjølmiðlafólki. Vit hava hesi seinnu árini hoyrt nógvar tílíkar søgur og sæð onkrar sjónvarpssendingar um hesar djørvu granskararnar, ið verða lýstir sum hetjur, sum berjast fyri sannleikanum.

Eftir øllum at døma hevur Bjarni Djurholm sæð eina av hesum fullkomiliga misvísandi og tendensiøsu sjónvarpssendingunum, sum nýliga var víst, og ivaleyst kann hann eins og onnur lata seg ávirka av henni. Hinvegin helt eg, at ein landsstýrismaður hevði eina, um ikki annað so moralska, skyldu til, at hava sakligar grundgevingar fyri tí, hann førir fram í Tinginum. Hann og hansara umsiting hava allar møguleikar til at fáa meiri álítandi tilfar til vega. Metingar av veðurlagsbroytingum verða regluliga gjørdar av ymsum almennum stovnum og av millumtjóða bólkum undir ST, Arktiska Ráðnum og øðrum. Hesar metingar geva eina heilt aðra mynd enn hana, sum landsstýrismaðurin í orkumálum bar fram í Tinginum, og so frægt mátti hann vitað.

Upprunin til hansara viðmerkingar var, eftir tí eg skilti, spurningurin, um Føroyar skulu taka undir við Kyoto sáttmálanum ella ikki. Hetta er ein politiskur spurningur, sum talast kann bæði fyri og ímóti, og ein og hvør má hava loyvi til at gera sær sína egnu niðurstøðu; men fortreytin má vera, at niðurstøðurnar byggja á sakligt grundarlag. Hetta átti í hvussu so er at verið eitt krav til øll orðaskifti á Tingi. Ein politikari kann hugsa so: *"Eg veit væl, at vit eru í ferð við at broyta veðurlagið á jørðini; men eg haldi ikki, at Føroyar hava ráð at gera sítt til at bøta um gongdina"*. Hetta haldi eg persónliga vera jánkasligt; men fyri tað kann tað vera sakligt. Men, at látast sum at ongin trupulleiki er, tá næstan alt próvtilfarið vísir tað øvuga, tað er beinleiðis ósakligt.

At enda ein stutt viðmerking um Kyoto og oljuframleiðslu. Velur Tingið at taka undir við Kyoto, fáa vit eina ávísa kvotu av koldioxid-útláti, sum vit ikki mugu fara upp um, og verður oljuframleiðsla við Føroyar, so kann tað kanska verða torført at halda hesa kvotu. Men, mær vitandi eru Kyoto kvoturnar umsetiligar. Rík lond kunnu keypa kvotur frá øðrum. Verður oljuframleiðsla í Føroyum, so hevði verið løgið, um ikki Føroyar fingu somikið av peningi burturúr henni, at vit kunnu keypa okkum ta neyðugu eykakvotuna.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.